Tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Justinus Eidesgaard, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Stefan í Skorini

Ítróttur: Jákup Mørk
Myndamenn: Jens Kristian Vang, Ólvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin

Bústaður: Argjavegur 26, Argir
Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820 Fax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: P/F Prentmiðstøðin

»Rættar« og fakligar meiningar

Oddagrein

Óansæð um man er samdur ella ikki, so sóu vit í farnu viku eitt áhugavert sjónarmið frá tveimum búskaparfrøðingum. Búskaparfrøðingarnir funnust millum annað at, at landsins virði verða forerd nøkrum fáum, ið so enntá kunnu selja hesi virði aftur fyri vinning. Nú fara vit ikki at viðgera sjálva greinina í smálutum, tað fer vónandi ein konstruktiv og mennandi faklig debat at gera. Hóast hettar, so loyva vit okkum at seta spurningin, um ikki tað er eitt skilagott grundsjónarmið, at um nakað skal kunna seljast, so skal tað eisini keypast. Hetta er eisini nakað, sum var frammi á landsfundi javnaðarfloksins í vikuskiftinum.

Tað er tíverri framvegis soleiðis í Føroyum í ár 2000, at fakligar meiningar bert verða tolereraðar av ávísum kreftum, um hesar fakligu meiningar eru "tær røttu". Vit sóu í Dagblaðnum eitt álop á tveir navngivnar búskaparfrøðingar, bara tí hesir dittaðu sær at hava eitt sjónarmið, ið ikki hóskaði til "vertin á hvat annar fær, eg skal nøra sjálvum mær — grundsjónarmiðið" hjá hesum blað. At tveir búskparfrøðingar seta fram eitt sjónarmið kann í summum førum elva til kjak, men harmiligt er, um farið verður eftir monnunum, heldur enn bóltinum. Vit sóu eisini hettar, tá Jørgen Niclasen uttan haldgóða argumentatión leyp á formannin í búskaparráðnum í fimmaranum fyrr í ár.

At Dagblaðið kemur við populistiskum skvaldri um Cand ditt og datt átti einans at fingið føroyska serfrøði og borgarar í allari almindiligheit at fingið eyguni upp fyri hvat Dagblaðið og Fólkaflokkurin stendur fyri.

Tað er alla æru vert, at fólk tora at standa fram við sínum fakligu meiningum. Harmiligt er, at man ikki kann gera hettar í Føroyum, uttan at verða persónliga hunddálkaður, og tí er uppaftur størri grund til at taka hattin av fyri fólki, ið tora hettar. Vit kunnu eisini skoyta uppí, at hesir báðir búskaparfrøðingarnir ikki eru í ringum selskapi, tá tað kemur til at verða hunddálkaður í Dagblaðnum. Tað hevði verið øll møgulig grund til at verið á varðhaldi, um hálv forsíðan á Dagblaðnum fór til at rósa teimum.

Hvar eru føroyskir búskaparfrøðingar? Hvat sigur búskapar- og løgfrøðingafelagið til, at fólk innan teirra fakumráði ikki kunnu gera sítt arbeiði, uttan at verða hunddálkað alment og tað entá í blaðnum hjá sjálvum løgmanni. Hettar átti at verið eitt upplagt evni til umrøðu í einum slíkum felag. Málið má vera at menna fakligt kjak við at eggja fólki at koma við sínum meiningum, uttan at tey skulu frykta fyri at verða persónliga útspilt alment.

Sosialurin

Viðmerking:

Hvat billar hon sær inn?

Á Internetinum hevur Danmarks Radio eina heimasíðu, "DR online", har tey millum annað spyrja ymiskar kendar danskarar, mest sjónleikarar, um støðuna til Evruna. Tann 22.9.00 svaraði Annika Hoydal, at hon atkvøddi nei, og tað er alt í lagi. Tað verður kanska ein meiriluti fyri nei í Danmark. Men so spyrja teir: "Dit bedste argument for et nej?" Og eg loyvi mær nú at endurgeva svarið, alt sum tað er. Citat:

"Jeg kommer fra Færøerne, der jo altid har været i konflikt med Danmark. Jeg ved, hvordan det er at komme fra et lille land, der er under andres varetægt, og jeg synes man forsvinder og at demokratiet drukner. Jo større hatten er, jo mere forsvinder man, og især når man bliver styret fra Langtbortistan. Det er nemmere at gennemføre et politisk system i et lille samfund."

Makan til svass, lygn og idioti havi eg aldri hoyrt. Lesið, vinarliga, alt citatið eina ferð aftrat! Fyrsta er, at har er einki argument, sum hevur við evruna at gera. Atkvøðan tann 28. sept. í Danmark snýr seg ikki um samveldi ella unión. Tað snýr seg um felags gjaldoyra. At tingini í "evsta" enda hanga saman, er sjálvsagt.

"*Jeg kommer fra Færøerne*...." Ja, longu her rodni eg. Hava fólk, sum koma úr Føroyum nakrar viðføddar fyrimunir, tá dømast skal um evruna? Ella nakrar viðføddar fyrimunir yvirhøvur? Eg haldi, at ofta (ikki altíð) vísir tað seg at vera beint tvørturímóti.

"*Færøerne, der jo altid har været i konflikt med Danmark*". Eg eri púra ovfarin av einum slíkum úttalilsi. Hvat meinar hon við? Hvørja konflikt? Kríggj? "*Altid*???" Legg merki til lítla orðið "*jo*", sum skal fáa lesaran at trúgva, at hesa "konflikt" vita øll um. At politisk osemja valdar í vissum lutum, er ein banal sjálvfylgja. Men Føroya og Danmarkar ímillum hava Grundlógin og Heimastýrislógin hesi seinastu fimti árini reguleráð viðurskiftini á góðan demokratiskan hátt. Og eg haldi, at konfliktirnar føroyinga sínámillum hava verið nógv sjónligari og til tíðir álvarsligari. Har hava bæði verið bumbur og rifluskot uppií. Nakað heilt annað er so, at tjóðveldismenn hava roynt at uppfunnið konfliktir. Tað mugu teir um, men teir eru ikki "*Færøerne*."

"*Jeg ved, hvordan det er at komme fra et lille land, der er under andres varetægt, ...*"

Hvat meinar hon við? Danskt diktatur í Føroyum? "*Varetægt*"? Varetægt er annars eitt positivt orð. At tage vare på; hetta merkir at røkja, varðveita og verja: Men var tað hetta hon meinti?

"*..og jeg synes, man forsvinder og at demokratiet drukner.*" Lesur tú setningin sum heild, eisini fyrra part omanfyri, so er hann uttan meining. Er tað í tí lítla landinum, at man druknar? Tað er nokk ikki meiningin, men soleiðis stendur tað skrivað. Ella meinar hon við, at einki demokrati er í Føroyum. At demokratið er druknað, tí at landið er skipað eftir Heimastýrislógini er í Ríkisfelagsskapinum, og ikki amt longur?

"*Jo større hatten er, jo mere forsvinder man,...*" Eg meini at hatta er nakað gass, ella í besta føri eitt romantiskt villfárilsi. Hví munnu nógvir føroyingar halda, at tað er liviligari í Havn enn á Slættanesi. Hatturin er størri í Havn, møguleikarnir størri. Ella hví munnu nógvir føroyingar halda tað verða gott at búgva í Danmark (einir 15.000) ella Norra ella Íslandi? Hatturin er størri, møguleikarnir fleiri.

"*Det er nemmere at gennemføre et politiskt system i et lille land.*" Nú skal eg ikki royna at leggja ov nógv í henda setning. Men hann kundi tulkast á ógvuliga negativan og ódemokratiskan hátt. Har stendur einki beinleiðis um demokrati, sum annars var um at drukna. Har stendur nakað um at "*gennemføre et politisk system*." Og tað kann skiljast á mangan hátt.

Men, meg lysti at frætt meira um hesa konflikt, sum "jú" altíð hevur verið millum Føroyar og Danmark.

Rolf Guttesen
23 September 2000

Sjúklig mentannaráskoðan

Tað kann ikki fara aftur við borðinum, at onkur ónevndur (hesaferð torir viðkomandi ikki eingong at seta dulnevnið undur) í oddagreinini í Dimmuni tann 19 sept. 2000, fer so við mentafólkinum í Føroyum.

Eftir at hava lisið oddagreinina, er ongin ivi um, at hesin/hendan hvørki hevur skil fyri mentan ella hvussu tað nú einaferð gongur fyri seg, tá ið sjálv skriviprossesin ferð fram.

Tað er nú einaferð so við mentan sum við øllum øðrum, at summi hava betur skil fyri hesum enn onnur. Tá ber ikki til at spyrja ein bakara, hvussu siglast skal út á Føroya Bankan, og soleiðis er eisini innan listaheimin, summi hava betur ættarsans enn onnur, sjálvt um tað finnast fólk, sum halda seg hava betur skil enn tey hava.

Og so hetta evindaliga jabbið um, at rithøvundar skulu vera fátækir sum kirkjurottan fyri at fáa nakað sum helst á skaftið. Tað er tað býttasta, sum sigast kann. At tey listarligu evnini blóma, tess meir ólukkuligur mann er, er nakað tvætt, tí um onkur brúkar síni listarligu evni til terapi, manglar áhugin fyri listini sum arbeiði. Hvussu við Jostein Gaarder, Peter Høeg, Stephen King, Per Kirkeby, George Michael? Eru teir minni listaliga begávaðir, tí at teir eiga nakrar milliónir á bankabók? Nei, tað vildi eg ikki meint. Mann kann ikki koyra allar sjangur, listagreinir og listarlig rák í ein sekk. Sjangrur eru so ymiskar. Tað finnast triviellar sjangrubøkur, so sum cowboybøkur, Morten Korch, Jane Aamund og eksperimenterandi sjangrur, so sum surrealisman, modernisman og postmodernisman. Tað eru eisini ymisk mørk innan aðrar listagreinar og so sanniliga innan listarlig rák eisini, sum ikki kunnu koyrast í ein kassa. Fyri at gera hetta nemmari at skilja, so er tað tað sama sum at siga, at Uni Arge er Føroya besti fótbólsleikari. Nemliga, tað ber heldur ikki til. Tað kann vera, at hann er Føroya besti framherji. Hann er í hvussu so er ikki Føroya besti bakkur, ella málmaður.

List er ikki ein kapping um, hvør er fátakastur, hvør hevur mest sinnisligar trupulleikar at dragast við, og hvør, ið sigur minst (sigur minst; tað er sum ein svenskari einaferð segði við meg. „Tað er sum føroyingar fáa pengar fyri at halda kjaft"). Nei, tað er um nakað heilt annað! Í mínum føri er tað, hvussu føroyskar bókmentir kunnu mennast, so at tær kunnu metast javnt við bókmentir í øðrum londum. Og fyri at hetta nøkulunda kann lata seg gera, mugu rithøvundar onkursvegna verða løntir, tí pengar skulu á borðið til akkurát tey somu tingini, sum onnur brúka pengar til. Er veruliga tann áskoðanin í Føroyum enn, at fátækari ein listamaður er, og størri pirru hann hevur á sálini, betri verður listin, so má okkurt elementert gerast fyri at broyta hesa áskoðan. Og um viðkomandi, ið hevur skrivað oddagreinina heldur, at rithøvundar fáa nakað sum helst fyri tað, sum skúlarnir brúka sum undirvísingartilfar, ja, so má viðkomandi stórliga hugsa seg um, ella í besta føri spyrja onkran rithøvund. Eg kann í hvussu so er siga fyri mít viðkomandi, at eg í ár havi fortjent uml. 55.000 krónur fyri mítt listarliga ískoyti, og tá havi eg fingið M. A. Jacobsen virðislønina omaná. Hetta er metár hjá mær. So spyrji eg bara; hvussu nógv smør, og hvussu nógva leigu kann eg gjalda fyri hasar pengarnar? Ikki tað stóra. Og tískil má eg hava okkurt annað arbeiði fyri at yvirliva. Við hesum er nærliggjandi at spyrja; hvat nú um summi blaðfólk á Dimmu vórðu noydd at fáa sær arbeiði í einum barnagarði, tí at tey ikki fingu nóg nógvar pengar fyri sítt yrki? Nei eg veit ikki. Tað kann eisini vera, at eg eri alt ov lukkuligur til at skilja sovorði møsn og vass.

PS: Til Betau: Um Zacharias Wang ikki kann brúka hátíðarhaldið í Sjónleikarhúsinum til „politiskt propaganda", tá ið hann nú einaferð hevur skrivað eina politiska bók, so kann blaðfólkið á Dimmuni heldur ikki brúka sítt blað til at niðurgera føroysk listafólk á so lágum støði.

Navn: Oddfríður Marni (ikki Marner)Rasmussen
Dulnevni: Ein virðisløntur mentunnarpávi

Vit eru stungin í ryggin

Føroya Areiðarafelag vil ikki góðtaka framferðina hjá Starvsmannafelagnum og tí er samstarvið ímillum fakfeløgini hótt

ÁKI BERTHOLDSEN

Samstarvið ímillum fleiri av teimum stóru fakfeløgini er nú av álvara hótt.

Tað er ein ósemja ímillum Føroya Arbeiðarafelag og Starvsmannafelagið, sum nú hevur sett kílar í samstarvið ímillum tvey av teimum størstu og mátt-miklastu fakfeløgunum.

Hesi bæði fakfeløgini eru tveir av limunum í Sjeymannabólkinum, sum er ein samstarvsbólkur, sum sjey av teimum stóru fakfeløgunum sita í.

Stjala limir

Men nú tekur Føroya Arbeiðarafelag fyrivarni fyri samstarvinum í Sjeymannabólkinum.

Orsøkin er, at Føroya Arbeiðafelag er sera ónøgt við framferðina hjá Starvsmannafelagnum í spurninginum um viðurskiftini hjá dagrøktarmammunum kring landið.

Allar dagrøktarmammur, uttan tær í Havn og í Klaksvík, eru limir í lokalfeløgum, sum eru limir í Føroya Arbeiðarafelag.

Men nú roynir Starvsmannafelagið at fáa dagrøktarmammur ymsastaðni í landinum at melda seg úr Føroya Arbeiðarafelag og upp í Starvsmannafelagið ístaðin.

– Hetta eru dagrøktarmammur, sum sjálvar hava meldað seg inn í tey lokalu arbeiðarafeløgini. Og hetta hendir samstundis sum vit royna at fáa sáttmála fyri dagrøktarmammurnar, sigur Ingeborg Vinther

Hon sigur, at hon veit meiri enn eitt dømi um, at Starvsmannafelagið hevur sett seg í samband við býráðs- og bygdaráðsformenn og biðið teir um at seta seg í samband við leiðararnar fyri dagrøktunum í kommununi. Leiðararnir eru í Starvsmannafelagnum og so skulu teir royna at fáa dagrøktarmammurnar at melda seg í Starvsmannafelagið, hóast tær longu eru limir í Føroya Arbeiðarafelag.

Hon veit eisini dømi um, at Starvsmannafelagið hevur boðið dagrøktarmammum, sum eru limir í Føroya Arbeiðarafelag, til kunnandi fund.

–Vit føla rætt og slætt, at Starvsmannafelagið hevur stungið okkum í bakið og slíka framferð, kunnu vit ikki góðtaka, sigur Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag.

Hon sigur, at ónøgdin við framferðina hjá Starvsmannafelagnum er so stór, at Føroya Arbeiðarafelag nú fer at umhugsaa støðu sína í Sjeymannabólkinum.

– Tað er ein spurningur um vit yvirhøvur kunnu taka lut í einum samstarvi saman við einum felag, sum stingur okkum so meint í ryggin, sum Starvsmannafelagið hevur gjørt.

Hon sigur, at í hesi vikuni fer nevndin í Føroya Arbeiðarafelag at gera støðuna upp.

– Í hesum fundinum fara vit at taka limaskap okkara í sjeymannabólkinum upp fyri at vita, um vit framhaldandi skulu vera við har.

– Síðani mugu vit hava fund við Sjeymannabólkin.

Hon sigur, at sjálv gevur hon lítið fyri slíkt samstarv, tá ið tað eina felagið kann bera seg so óloyalt at ímóti einum øðrum felag og tí mugu viðurskiftini takast upp.

– Tað, sum Starvsmannafelagið ger, er so óloyal framferð, sum eg ikki havi vitað áður, sigur Ingeborg Vinther.

Umframt hesi bæði feløgini, eru tað Sjúkrasystrafelagið, Lærarafelagið, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Havnar Arbeiðsmannafelag og Havnar Handverkarafelag, sum eru limir í Sjeymannabólkinum.

Ingeborg Vinther heldur, at tað vildi verið stórt spell, um hetta samstarv skuldi dottið niðurfyri, tí tað hevur verið gott og tað hevur eisini havt slagkraft.

Tað eydnaðist ikki at fáa eina viðmerking til støðuna frá Starvsmannafelagnum áðrenn blaðið fór til prentingar, tí formaðurin var ikki at hitta.

Fyri kortum høvdu dagrøktarmammurnar kting landið fund við leiðsluna í Føroya Arbeiðarafelag um sáttmálaviðurskiftini. Dagrøktarmammurnar eru limir í Føroya Arbeiðarafelag, men nú roynir Starvsmannafelagið at stjala tær. Eg havi aldrin vitað so óloyala framferð, sigur Ingeborg Vinther. Mynd: J.Kr. Vang.

Nú skal nýggjur studentaskúli byggjast í Vági

Peningur skal setast av til projektering næsta ár og so verður farið í holt við byggingina beinanvegin í 2001

ÁKI BERTHOLDSEN

Nú skal nýggjur studentaskúli byggjast í Vági.

Torbjørn Jacobsen, landsstýrismaður í skúlamálum, sigur, at landsstýrið hevur sett eina millión av á fíggjarlógini komandi ár til at projektera nýggjan miðnámsskúla í Vági.

Ætlanin er so at seta tilsamans 21 milliónir av, umframt mvg, til at byggja skúlan fyri.

Peningurin skal setast av í 2001, 2002 og 2003, so at skúlin skal vera liðugur í 2003.

Torbjørn Jacobsen sigur, at ætlanin er at seta eina bygginevnd at fyrireika arbeiðið. Ætlanin er at velja bygginevndina heilt skjótt so at hon sleppur til verka beinanvegin í komandi ári.

Bygginevndin skal síðani leggja arbeiðið til rættis, men landsstýrismaðurin væntar, at arkitektkapping verður fyriskipað um skúlan.

Miðnámsskúlin í Suðuroy hevur havt eina umskiftiliga tilveru. Tey fyrstu árini var undirvísing bæði á Tvøroyri og í Vági. Seinni var hann fluttur til Vágs burturav, men har hevur hann hildið til í trimum ymsum húsum og tað eru ikki tær bestu umstøðurnar.

Ein orsøk til, at skúlin ikki langt síðani hevur fingið hóskandi høli, er, at suðuroyingar samdust ongantíð um, antin skúlin skuldi vera, á Tvøroyri ella í Vági.

Í áttatiárunum var neyðsemja gjørd um at byggja skúlan í Hovi. Skúli varð teknaður, men so kom kreppan og beindi fyri teirri ætlanini.

Torbjørn Jacobsen sigur, at ætlanin er ikki at byggja uppí skúlan sum er, men at byggja ein spildurnýggjan skúla og hann skal vera í Vági.